# Góða mold frá Hjálpirót

Hjálpirót hevur í fleiri ár selt sorteraða sandblandaða mold. Tá vóru nakrir smáateinar og grasbøkkar í. Men nú hevur Hjálpirót gjørt íløgu í eina mold-sorteringsmaskinu fyri yvir hálva millión, fyri at kunna betra um góðskuna á moldini. Tann moldin, sum Hjálpirót nú selur, er so væl sorterað, at tað mest sum ongir steinar eru í. Sandurin í moldini ger at moldin er leys og løtt at leggja út og er tí løtt at lúka í eisini. Moldin er vælegnað til beð og til toplag til grasvøllir. Tá moldin er løgd út, skal hon taðast - alt eftir hvat hon verður brúkt til.






*– Okkara sjófólk eru álitið umborð á fiskiskipum, handilsskipum, ferðamannaskipum osfr. – og nú eisini í frálandavinnuni segði Marner Jacobsen, stjóri í EIK m.a í røðu í Norðurlandahúsinum*

at kunna hava verið ein partur av hesi spennandi verkætlan.

Eik hevur staðið á odda fyri fíggingini saman við Realinum og Landsbanka Íslands. Vit mugu siga at hóast avbjóðingar hava verið á vegnum, hevur samstarvið millum hesar fíggjarstovnar og reiðaríðið verið sera gott alla tíðina. Vit meta øll, at hendan verkætlanin við tí samanseting av partaeigarum, leiðslu, nevnd, starvsfólki og ikki minst bygging av einum sera umhvørvisliga framkomnum supplyskipi, er eitt sera gott grundarlag undir framtíðar menningini og møguleikunum hjá felagnum.

Uttan at taka nakað frá nøkrum persóni í felagnum ella millum partaeigararnar, má eg serliga nevna, at hesin dagurin í dag má vera serliga stórur fyri Tummas, sum um nakar frá byrjan hevur verið tann, sum hevur sæð størstu møguleikarnar í hesi verkætlan.

Tað hevur verið sera læruríkt og mennandi, eisini hjá okkum sum fíggjarstovni, at hoyra um stóru ætlaninar hjá Tummasi og teirra reiðaríi, og hvussu hann frá byrjan hevði stórar visiónir um, hvussu eitt føroyskt supplyfelag átti at byggjast upp. Ikki við gomlum skipum, ella sum dótturfelag hjá onkrum útlendskum stórfelag. Nei, visiónin var, at talan skuldi verða um eitt føroyskt supplyfelag, sum skuldi royna at uppbyggja eina føroyska servitan innan supplyvinnuna, og at byggjast skuldu nýggj skip til endamálið, sum skuldu verða kappingarfør at bjóða uppá charteravtalur javnbjóðis við útlendsk supplyfeløg. Hesa visión hava Tummas og nú eisini Jens Meinhard sum leiðsla í felagnum arbeitt miðvíst eftir hvønn dag. Harumframt hevur leiðslan fingið góðan stuðul frá eini væl skikkaðari nevnd.

Vit mugu í dag siga, at visiónin hjá felagnum – so langt – hevur eydnast. Umframt at felagið hevur fingið sítt fyrsta supplyskip, so hevur felagið síðstu árini harafturat uppbygt eina organisatión og servitan, sum hevur gjørt, at Supply Service í dag hevur hægstu certificeringar innan frálandavinnuna í Føroyum. Tí kann felagið við sínum skipi, á jøvnum føti við eitt nú norsk supplyfeløg, bjóða uppá charteravtalur á norskum sjóøki.

Hetta hevur t.d. merkt, at supplyskipið Eldborg í dag hevur ein nøktandi 4 ára chartersáttmála við norska felagið Revus Energy. Hetta má metast at verða ein sera góð byrjan.

Tummas og Jens Meinhard, Osmund og tit, sum annars standa aftanfyri felagið, stóra takk fyri gott samstarv og hjartaliga tillukku.

Eg vil ynskja Supply Service og P/F Eldborg – og øllum tykkum, ið skulu hava tykkara starv við ella í samband við skipið alt tað besta við nýggja skipinum.

Enn einaferð hjartaliga tillukku og takk fyri.”